HAGSTOVA FØROYA

Ískoytisupprit um økisbýtt ferðavinnuhagtøl

Regional Tourism Satellite Account

INNIHALD

1 Inngangur 4
1.1 Bygnaður á ískoytisuppritinum 4

2 Hagtalsframleiðsluleisturin - GSBPM 5

3 Regional Tourism Satellite Account 7

4 Raðfesting av talvum 9

5 Tilgongdir og atlit 10
5.1 Top-down og bottom-up tilgongd 10
5.2 Trúnaðarverja 10

6 Hugtøk og ítøkiliggerð 12
6.1 Øki 12
6.2 Arbeiðsstað 12
6.3 Býtislyklar 12
6.4 Vinnugrein innan ferðavinnu 13
6.5 Yvirlit yvir vinnugreinar innan ferðavinnu sambært ISIC 14
6.6 Vinnugreinaflokking – ISIC og NACE 15

7 Dátukeldur 18
7.1 Spurnakanningin til føroyskar ferðavinnuveitarar 18
7.2 Spurnakanningin til ferðafólk 18
7.3 Roknskaparskipanin 18
7.4 Gistingarskipanin 18
7.5 Uppgerð av ferðandi, sum ferðast sjóvegis 18
7.6 Virkisskráin 19
7.7 Løn og arbeiðstíð 19
7.8 Hagtalsskipanin fyri almenna geiran 19
7.9 Gjaldskortsdátur 19
7.10 Eurostat: Airbnb, Tripadvisor, Expedia og booking.com 20

8 Mát 21
8.1 Yvirlit yvir tær 10 talvurnar 21
8.2 Talva 1 – Nýtsla í inngangandi ferðavinnu 22
8.3 Talva 2 – Nýtsla í innlendis ferðavinnu 24
8.4 Talva 3 – Nýtsla í útgangandi ferðavinnu 26
8.5 Talva 4 – Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu 28
8.6 Talva 5 – Framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum 30
8.7 Talva 6 – Ferðavinnan í búskapinum 33
8.8 Talva 7 – Starvssetanir í ferðavinnuni 37
8.9 Talva 8 – Samlaða virðið av íløgum í ferðavinnuni 40
8.10 Talva 9 – Almenna felagsnýtslan innan ferðavinnu 43

8.11 Talva 10 – Ikki-peningaligir ávísar 45
8.12 Talva 10a – Tal av ferðum og gistingum 46
8.13 Talva 10b – Inngangandi ferðavinna: Komur og gistingar 48
8.14 Talva 10c – Tal av gistingarstøðum og kapasitetur 50
8.15 Talva 10d – Tal av arbeiðsstøðum í vinnugreinum innan ferðavinnu 52

9 Dømi um úrslit 54
9.1 Dømi: Nýtsla í inngangandi ferðavinnu – býtt á øki 54
9.2 Dømi: Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu – býtt á øki 55
9.3 Dømi: Nýtsla í inngangandi ferðavinnu í Tórshavn 56
9.4 Dømi: Gistingar á gistingarhúsi eftir endamáli við ferð 57
9.5 Dømi: Ársverk í inngangandi ferðavinnu – býtt á øki 58
9.6 Dømi: Ársverk í inngangandi ferðavinnu í Tórshavn 59
9.7 Nýtsla í inngangandi ferðavinnu í Suðurstreymoy 60

10 Menningarætlan 61

11 Keldulisti 63

1 INNGANGUR

Visit Faroe Islands hevur biðið Hagstovu Føroya um eina forkanning av at menna økisbýtt ferðavinnuhagtøl í Føroyum. Framleiðsla av ferðavinnuhagtølum eftir Tourism Satellite Account-leisti kann nevniliga tillagast til at framleiða økisbýtt ferðavinnuhagtøl. Hetta verður nevnt *Regional Tourism Satellite Account,* stytt *RTSA.*

Í stuttum merkir hetta, at ferðavinnuhagtøl verða framleidd fyri ymisk øki í hvørjum landi, soleiðis at tað ber til at lýsa búskaparliga týdningin av ferðavinnuni í einum ávísum øki. Tá ber til dømis til at lýsa nýtsluna hjá ferðafólkum, sum vitja í Norðoyggjum ella hvussu nógv í Suðuroy arbeiða í ferðavinnuni. Tá ið slík økisbýtt ferðavinnuhagtøl verða framleidd, ber eisini til at samanbera ferðavinnuna í teimum ymisku økjununum í landinum umframt at samanbera øki í Føroyum við líknandi øki í øðrum londum.

Hetta ískoytisuppritið vísir til høvuðsuppritið um Tourism Satellite Account. Uppritið avmarkar seg til at lýsa, hvussu úrslitini í Tourism Satellite Account verða økisbýtt til Regional Tourism Satellite Account.

1.1 BYGNAÐUR Á ÍSKOYTISUPPRITINUM

Uppritið er skipað í fleiri pørtum. Í fyrsta parti verður leisturin útgreinaður, sum hendan forkanningin byggir á og lýst verður, hvønn part av hagtalsframleiðsluni uppritið er avmarkað til. Síðan verður greitt stutt frá Regional Tourism Satellite Account, sum økisbýttu ferðavinnuhagtølini byggja á. Eftir hendan partin verður lýst, hvørjar av teimum 10 talvunum í Tourism Satellite Account verða raðfestar í sambandi við Regional Tourism Satellite Account. Síðan verður greitt frá tilgongdum og atlitum í sambandi við menning og framleiðslu av RTSA. Eftir hetta verða hugtøk og ítøkiliggerð lýst. Síðan verða dátukeldur lýstar, sum skulu brúkast til arbeiðið við RTSA.

Aftaná hesar partar hetta verða tær 10 talvurnar í Tourism Satellite Account gjøgnumgingnar, har lýst verður, hvørjar talvur kunnu økisbýtast til Regional Tourism Satellite Account og á hvønn hátt hetta kann gerast. Síðan verður víst á nøkur ítøkilig dømi, sum kunnu koma burturúr teimum 10 talvunum, tá ið økisbýtt ferðavinnuhagtøl verða framleidd. Eftir hetta verður ein menningarætlan lýst við støði í menningarætlanini fyri TSA.

2 HAGTALSFRAMLEIÐSLULEISTURIN - GSBPM

Forkanningin er skipað eftir altjóða standardiseraðum leisti fyri hagtalsframleiðslu, *Generic Statistical Business Process Model* (stytt *GSBPM*), sum hagstovur brúka, tá tær greina og meta um allar neyðugar tættir í nýggjari hagtalstilgongd.

Leisturin hevur greiðar mannagongdir fyri tørvslýsing, sniðgeving av ynskta hagtalsúrslitinum, samanseting av innheintingaramboðum, innsavnan av upplýsingum, viðgerð av hagtølum, greining, miðlan og eftirmeting av hagtalsframleiðsluni.

Yvirskipaði leisturin fyri hagtalsframleiðslu kann býtast upp í tveir serstakar partar, sum verða lýstir á myndini á næstu síðu. Fyrri parturin snýr seg um at byggja hagtalsskipanina (stig 1-3), ímeðan seinni parturin snýr seg um at framleiða hagtøl (stig 4-8).

Uppritið avmarkar seg til fyrsta stig í GSBPM, sum snýr seg um at lýsa tørvin í sambandi við menning av Regional Tourism Satellite Account. At lýsa tørvin snýr seg um at eyðmerkja tørv, eftirkanna og staðfesta tørvin, áseta ynskta úrslitið, eyðmerkja neyðugu hugtøkini í hagtalsframleiðsluni, kanna hvørji hagtøl eru tøk til hagtalsframleiðslu og til seinast at fyrireika eina kostnaðarmeting.

Hagtalsframleiðslu-myndilin

Generic Statistical Business Process Model

1 Lýsa tørvin
Specify Needs

1.1 Greina tørvin
Identify needs

1.2 Eftirkanna og staðfest tørvin
Consult and confirm needs

1.3 Áseta endamálið við høvuðsmátunum
Establish output objectives

1.4 Eyðmerkja hugtøkini
Identify concepts

1.5 Kanna tøkar dátur
Check data availability

1.6 Seta upp avgerðargrundarlag
Prepare and submit business case

2 Sniðgeva skipan
Design

2.1 Áseta mátini
Design outputs

2.2 Lýsa variablarnar
Design variable descriptions

2.3 Sniðgeva innsavningar-háttalagið
Design collection

2.4 Áseta úrvalsfjøld og stakroyndir
Design frame and sample

2.5 Sniðgeva hagfrøðiliga háttalagið
Design processing and analysis

2.6 Sniðgeva framleiðsluskipanina og arbeiðsgongdirnar
Design production systems and workflow

3 Byggja skipan
Build

3.1 Byggja ella endurnýta innheintingaramboðini
Reuse or build collection instruments

3.2 Byggja ella endurnýta greiningarkomponentar
Reuse or build analysis components

3.3 Byggja ella endurnýta útgávukomponentar
Reuse or build dissemination components

3.4 Skipa arbeiðsgongdirnar
Configure workflows

3.5 Royndarkoyra framleiðsluskipanirnar
Test production systems

3.6 Royndarkoyra hagtalsskipanina
Test statistical business process

3.7 Samanseta endaligu framleiðsluskipanina
Finalise production systems

4 Heinta inn dátur *Collect*

4.1 Áseta úrvalsfjøld og gera stakroyndarúrval
Create frame and select sample

4.2 Skipa innheintan
Set up collection

4.3 Fremja innheintanina
Run collection

4.4 Leggja dátutilfarið í viðgerðarskipanina
Finalise collection

5 Viðgera tilfarið
Process

5.1 Seta dátur saman frá ymsu keldunum
Integrate data

5.2 Flokka og kota
Classify and code

5.3 Eftirkanna og góðskutryggja tilfarið
Review and validate

5.4 Editera og imputera
Edit and impute

5.5 Gera avleiddar variablar og eindir
Derive new variables and units

5.6 Rokna vektir
Calculate weights

5.7 Rokna totalar
Calculate aggregates

5.8 Gera endaligar *(makro)* dátutalvur
Finalise data files

6 Greina tilfarið
Analyse

6.1 Fyrireika og víðka hagtølini
Prepare draft outputs

6.2 Eftirkanna hagtølini
Validate outputs

6.3 Tulka og greina hagtølini
Interpret and explain outputs

6.4 Diskretionera
Apply disclosure control

6.5 Gera endaliga útgávutilfarið
Finalise outputs

7 Miðla hagtølini
Disseminate

7.1 Dagføra útgávuskipanina
Update output systems

7.2 Framleiða útgávutilfarið
Produce dissemination products

7.3 Skipa leysgeving av útgávuni
Manage release of dissemination products

7.4 Miðla útgávuna
Promote dissemination products

7.5 Skipa brúkara-hjálp
Manage user support

8 Eftirmeta
Evaluate

8.1 Savna íkast til eftirmetingina
Gather evaluation inputs

8.2 Eftirmeta
Conduct evaluation

8.3 Gera ætlan fyri betringum
Agree an action plan

3 REGIONAL TOURISM SATELLITE ACCOUNT

Økisbýtt ferðavinnuhagtøl, sum verða framleidd eftir Tourism Satellite Account-leisti, verða nevnd Regional Tourism Satellite Account, stytt *RTSA.* Í stuttum merkir hetta, at ferðavinnuhagtøl verða framleidd fyri ymisk øki í einum landi, soleiðis at tað ber til at lýsa búskaparliga týdningin av ferðavinnuni í einum ávísum øki. Regional Tourism Satellite Account byggir víðari á somu uppgerðarhættir, sum verða brúktir til framleiðslu av Tourism Satellite Account.

Við RTSA ber til dømis til at lýsa nýtsluna hjá ferðafólkum, sum vitja í Vágum ella hvussu nógv arbeiða í ferðavinnuni í Suðurstreymoy. Tá ið slík økisbýtt ferðavinnuhagtøl verða framleidd, ber eisini til at samanbera ferðavinnuna í teimum ymisku økjununum í landinum umframt at samanbera øki í Føroyum við líknandi øki í øðrum londum.

RTSA kann brúkast sum stýringsamboð fyri ferðavinnuna í einum øki á sama hátt sum TSA kann brúkast sum stýringsamboð fyri ferðavinnuna í landinum sum heild.

HANDBØKUR OG RIT

Handbókin *Tourism Satellite Account: Recommended Methodological Framework 2008* (stytt TSA: RMF 2008) er saman við handbókini *International Recommendations for Tourism Statistics 2008* grundarlagið undir menning og framleiðslu av Tourism Satellite Account. Hetta eru altjóða viðurkendar handbøkur, sum eru úrslit av samstarvi ímillum fleiri altjóða felagsskapir, so sum hagtalsstovnurin hjá ST, altjóða ferðavinnustovnurin hjá ST (World Tourism Organization, UNWTO), OECD og Eurostat. Hesir altjóða felagsskapir hava í felag gjørt leiðreglurnar fyri TSA.

Enn er tó ongin felags viðurkend handbók skrivað um Regional Tourism Satellite Account, hóast tað verður stutt lýst í TSA: RMF 2008 (s. 105-107), at tað ber til at gera økisbýtt ferðavinnuhagtøl.

Grundarlagið undir viðmælunum í hesum uppritinum byggja serliga á ritið *Regional Tourism Satellite Account*, sum UNWTO gav út í 2013 og viðmæli hjá serfrøðingunum innan ferðavinnuhagtøl Christi Frenţ og Douglas C. Frechtling, sum verða lýst í ritinum *Regional Tourism Satellite Accounts: Towards International Comparability*. Ritið varð útgivið í 2020 og er tað fyrsta, sum lýsir altjóða samanbæri ímillum RTSA úr 14 ymiskum londum.

Afturat hesum báðum ritunum er frágreiðingin hjá Nordregio, *Regional Tourism Satellite Accounts for the Nordic Countries*, sum varð útgivin í í 2021, brúkt sum støðulýsing av menningini av RTSA í einstøku Norðurlondunum.

Ein fortreyt fyri at kunna gera ískoytið hjá ferðavinnuni upp í einum einstøkum øki, er at hava ein økisbýttan tjóðarroknskap. Handbókin, sum lýsir økisbýttan tjóðarroknskap, er *Manual on Regional Accounts Methods* hjá Eurostat.

REGIONAL TOURISM SATELLITE ACCOUNT Í NORÐURLONDUM

Fleiri av hinum Norðurlondunum hava arbeitt við at menna Regional Tourism Satellite Account í nógv ár og serliga Danmark er frammaliga á hesum øki. Hagstova Føroya og Visit Faroe Islands eru partur av norðurlendskum samstarvi, sum er í ferð við at menna felags hugtøk og háttalag fyri framleiðslu av RTSA í Norðurlondum. Endamálið við norðurlendska samstarvinum er at menna eina handbók fyri RTSA í Norðurlondum fyri at hava somu uppgerðarhættir tvørtur um landamørk.

Hagstova Føroya hevur fingið innlit í royndir og avbjóðingar við at menna RTSA í Danmark og Svøríki og kunning um teirra núverandi arbeiði og framtíðarætlanir við RTSA. Innlitið skal serliga stuðla undir, at menningartilgongdin av RTSA í Føroyum ikki verður darvað av somu byrjanartrupulleikum sum í Danmark og Svøríki. Samstundis hevur hetta givið fyridømi um, hvussu RTSA kann mennast og framleiðast í Føroyum.

Bæði í Danmark og Svøríki verður víst á, at ferðavinnan kann gerast ein avgerandi vinna í smærri økjum, har vinnuligu møguleikarnir eru avmarkaðir. Ferðavinna kann tí geva smærri økjum møguleika fyri búskaparligum vøkstri. Harumframt verður víst á, at ferðavinnan serliga spælir ein størri og størri leiklut í høvuðsstøðum og størri býum.

Fyri at máta búskaparliga týdningin av ferðavinnuni í einum øki er neyðugt at framleiða økisbýtt ferðavinnuhagtøl.

4 RAÐFESTING AV TALVUM

Í handbókini um Tourism Satellite Account verður mælt til at framleiða 10 ávísar talvur um ferðavinnuna í einum landi. Av tí at ongin handbók finst um Regional Tourism Satellite Account, er neyðugt at taka støðu til, hvørjar talvur eru viðkomandi og skulu framleiðast í sambandi við økisbýtt ferðavinnuhagtøl.

Tilmæli um raðfesting av talvum fyri eina føroyska RTSA byggja á viðmæli hjá serfrøðingunum innan ferðavinnuhagtøl Christi Frenţ og Douglas C. Frechtling, sum verða lýst í ritinum *Regional Tourism Satellite Accounts: Towards International Comparability.*

VIÐMÆLI FRÁ FRENŢ OG FRECHTLING

Frenţ og Frechtling (2020: 99) viðmæla, at 5 talvur út av teimum 10 talvunum í TSA verða økisbýttar og skulu raðfestast í sambandi við RTSA:

Talva 4 – Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu

Talva 5 – Framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum- og tænastum

Talva 6 – Ferðavinnan í búskapinum

Talva 7 – Starvssetanir í ferðavinnuni

Talva 10 – Ikki-peningaligir ávísar

Fyri at framleiða talvu 4 er eisini neyðugt at økisbýta og framleiða talvu 1 og 2, tí meginparturin av talvu 4 er ein samanlegging av talvu 1 og 2. Hetta merkir, at tað í veruleikanum verður viðmælt at framleiða 7 talvur í RTSA.

Hesar talvur skulu sambært Frenţ og Frechtling ikki raðfestast í sambandi við RTSA:

Talva 3 – Nýtsla í útgangandi ferðavinnu

Talva 8 – Samlaða virðið av íløgum í ferðavinnuni

Talva 9 – Almenna felagsnýtslan innan ferðavinnu

RAÐFESTING AV TALVUM Í RTSA Í FØROYUM

Í tilgongdini av at kanna møguleikar fyri menning av RTSA í Føroyum er Hagstova Føroya saman við Visit Faroe Islands komin fram til, at hesar talvur kunnu økisbýtast og skulu raðfestast:

Talva 1 – Nýtsla í inngangandi ferðavinnu

Talva 2 – Nýtsla í innlendis ferðavinnu

Talva 4 – Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu

Talva 5 – Framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum- og tænastum

Talva 6 – Ferðavinnan í búskapinum

Talva 7 – Starvssetanir í ferðavinnuni

Talva 10 – Ikki-peningaligir ávísar

Metingin av, hvørjar talvur kunnu framleiðast í RTSA í Føroyum, verður lýst nærri í gjøgnumgongdini av talvunum í áttanda parti í uppritinum.

5 TILGONGDIR OG ATLIT

Uppgerðin av Regional Tourism Satellite Account kann byggja á ymiskar tilgongdir. Høvuðstilgongdirnar eru ein top-down tilgongd og ein bottom-up tilgongd. Tað ber eisini til at hava eina samanseting av hesum tilgongdum. Hesar tríggjar tilgongdir verða lýstar í ritinum *Regional Tourism Satellite Accounts: Towards International Comparability* eftir serfrøðingunum innan ferðavinnuhagtøl Christi Frenţ og Douglas C. Frechtling og í ritinum *Regional Tourism Satellite Account* hjá ferðavinnustovninum hjá ST, UNWTO.

5.1 TOP-DOWN OG BOTTOM-UP TILGONGD

Ein top-down (úr erva og niður) tilgongd til RTSA tekur útgangsstøði í úrslitunum frá TSA, sum eru fyri alt landið. Úrslitini fyri alt landið verða við viðkomandi býtislyklum býtt út á øki í landinum, soleiðis at ferðavinnuhagtøl kunnu framleiðast fyri hvørt øki. Grundarlagið undir hesari tilgongdini er, at landið framleiðir eina TSA. Ein av fyrimununum við hesari tilgongdini er, at økisbýttu úrslitini samsvara við samlaðu úrslitini fyri landið.

Ein bottom-up (niðrifrá og upp) tilgongd verður hinvegin gjørd upp við at framleiða eina útgávu av TSA fyri eitt ávíst øki. Hetta er ikki grundað á úrslitini í TSA, men verður framleitt bert fyri tað økið. Hetta merkir vanliga, at úrslitini fyri ferðavinnufyritøkurnar í økinum verða tald saman uttan mun til samlaða úrslitið í TSA, sum er fyri alt landið. Tað merkir, at økisbýttu úrslitini ikki neyðturviliga samsvara við samlaðu úrslitini fyri landið.

Ein triði møguleiki er at samanseta báðar tilgongdirnar. Á enskum verður hendan tilgongdin nevnd *hybrid approach* og *combination approach*. Hetta merkir, at partar av báðum tilgongdum verða samansettir á ein slíkan hátt, at ágóðar fáast burturúr fyrimununum av báðum tilgongdunum.

UNWTO leggur í hesum sambandi dent á, at tað hevur týdning, at úrslitini í RTSA altíð samsvara við úrslitini í TSA fyri landið.

5.2 TRÚNAÐARVERJA

Eitt atlit, sum altíð er neyðugt at taka, tá ið hagtøl verða framleidd, er trúnaðarverja (á donskum *diskretionering*). Hagstovur hava skyldu til at tryggja, at tað ikki ber til at kenna ein einstakan persón ella einstaka fyritøku aftur í hagtølum, sum verða útgivin. Fyri at tryggja slíka trúnaðarverju í sambandi við útgávu av hagtølum, er ásett, at tað skulu vera minst tríggir persónar ella fyritøkur í einum bólki fyri at kunna almannakunngera upplýsingar.

Trúnaðarverja í sambandi við RTSA merkir, at tað til dømis ikki ber til at lýsa nýtsluna innan tænastuveiting av mat- og drykkjuvørum í einum øki, um tað bert er ein veitari í økinum. Tað skulu vera í minsta lagi tríggir veitarar fyri, at krøv um trúnaðarverju verða lokin.

Tað ber til at loysa avbjóðingar um trúnaðarverju upp á ymiskar mátar. Um eitt øki bert hevur ein veitara innan gistingartænastur, men tveir veitarar innan tænastuveiting av mat- og drykkjuvørum, ber til at leggja hesar bólkar saman og síðan lýsa nýtsluna í báðum vinnugreinum samlað. Eru tað bert tríggir ferðavinnuveitarar í økinum tilsamans, ber einans til at lýsa alla nýtsluna í økinum samlaða og tá ber ikki til at býta nýtsluna út á vørur ella vinnugreinar.

Trúnaðarverja er avgerandi í sambandi við at áseta, hvørji øki kunnu lýsast í RTSA. Tess minni økini eru, tess størri er sannlíkindini fyri, at tað eru færri enn tríggir veitarar í einari vinnugrein. Tað ber

tí ikki til at áseta endalig øki í uppgerðini fyri RTSA í Føroyum, fyrr enn upplýsingar eru innsavnaðar til hagtalsframleiðsluna.

6 HUGTØK OG ÍTØKILIGGERÐ

Í hesum parti verða hugtøk lýst, sum eru viðkomandi fyri arbeiðið við Regional Tourism Satellite Account, stytt *RTSA*. Hugtøkini verða harumframt gjørd ítøkilig, soleiðis at tey kunnu nýtast til arbeiðið við RTSA.

Hugtøk innan ferðavinnuhagtøl sum heild verða ikki lýst í hesum uppritinum. Víst verður í hesum sambandi til høvuðsuppritið um TSA.

6.1 ØKI

Eitt øki í RTSA avmarkar seg til eitt landafrøðiligt øki. Sum útgangsstøði avmarkar hugtakið seg ikki til eina ávísa stødd av øki. RTSA leggur tó upp til at býta lond upp í landafrøðilig øki (á enskum *regions)*. Hagstova Føroya býtir vanliga hagtøl upp eftir teimum sjey økjunum Suðurstreymoy, Norðstreymoy, Norðoyggjar, Eysturoy, Suðuroy, Vágar og Sandoy. Í løtuni verða gistingarhagtøl býtt upp í tvey øki, sum eru Tórshavnarøkið og hini økini í Føroyum samlað orsakað av atlitum um trúnaðarverju.

Mett verður, at tað í fleiri førum ber til at framleiða RTSA fyri tey sjey økini Suðurstreymoy, Norðstreymoy, Norðoyggjar, Eysturoy, Suðuroy, Vágar og Sandoy. Tá ið hetta ikki ber til vegna atlit um trúnaðarverju, kann uppbýtingin vera Tórshavnarøkið og hini økini av Føroyum samlað.

Eisini ber til at býta ferðavinnuhagtøl út á kommunur í tann mun, at tað lýkur treytir um trúnaðarverju.

Mælt verður til, at dátur, sum verða savnaðar inn til økisbýtt ferðavinnuhagtøl, verða savnaðar inn eftir adressum. Hetta ger tað smidligt at gera samanteljingar fyri øki í Føroyum. Økini, sum verða brúkt til RTSA, verða ikki endaliga ásett í hesari forkanningini, tí uppbýtingin skal lúka krøv um trúnaðarverju (á donskum *diskretionering).*

6.2 ARBEIÐSSTAÐ

Eitt arbeiðsstað er eitt stað, har arbeiðið í einari fyritøku verður framt. Ein fyritøka hevur í minsta lagi eitt arbeiðsstað. Summar fyritøkur hava fleiri arbeiðsstøð og harvið fleiri adressur. Til dømis kann ein fyritøka eiga eitt hotell og fimm ymiskar matstovur, sum eru á hvør sínari adressu. Tað merkir, at hendan fyritøkan hevur seks arbeiðsstøð.

Eitt arbeiðsstað er eitt týdningarmikið hugtak í sambandi við framleiðslu av RTSA, tí at arbeiðsstaðið lýsir í hvørjum øki virksemið fer fram.

Í sambandi við forkanningina er eitt arbeiði gjørt við at útgreina, hvussu nógv arbeiðsstøð fyritøkurnar hava, sum eru í núverandi yvirliti yvir føroyskar ferðavinnuveitarar. Hetta er yvirlitið, sum verður brúkt til spurnakanningina til ferðavinnuveitarar, sum er grundarlagið undir árligu búskaparligu ískoytiskanningini.

6.3 BÝTISLYKLAR

Ein býtislykil er ein háttur at býta og soleiðis útgreina eitt samlað úrslit. Eitt samlað úrslit kann til dømis vera sølan hjá einari fyritøku. Fyri at gera søluna upp eftir arbeiðsstaði hjá einari fyritøku, sum hevur fleiri arbeiðsstøð, kann ein býtislykil nýtast, soleiðis at sølan kann útgreinast á arbeiðsstøðini. Ein býtislykil kann til dømis vera starvssetanir. Tað merkir, at um 20 fólk starvast á

einum arbeiðsstaði og 100 starvsfólk eru í fyritøkuni tilsamans, fær hetta arbeiðsstaðið ásett 20% av søluni.

Býtislyklar hava týdning fyri RTSA og eru serliga viðkomandi fyri at kunna útgreina viðkomandi hagtøl út á arbeiðsstøð og harvið øki.

6.4 VINNUGREIN INNAN FERÐAVINNU

Virksemið hjá øllum fyritøkum í einum landi verður flokkað í vinnugreinar.

Tourism Satellite Account brúkar vinnugreinaflokkingina hjá ST, sum eitur ISIC, at áseta, hvørjar vinnugreinar eru innan ferðavinnu.

Talvan á næstu síðu vísir eina bólking av vinnugreinakotum innan ferðavinnu eftir ISIC-vinnugreinaflokkingini. Tað vil siga, at tølini úti í høgru síða vísa vinnugreinakotur, ímeðan yvirskriftirnar á vinstru síðu eru bólkingar av vinnugreinum innan ferðavinnu.

6.5 YVIRLIT YVIR VINNUGREINAR INNAN FERÐAVINNU SAMBÆRT ISIC

		ISIC rev. 4	ISIC Description
1.	Gistingartænastur til vitjandi	5510	Short term accomodation
1.		5510	Short term accomodation
1.		5520	Camping grounds, recreational vehicle parks and trailer parks
1.		5590	Other accommodation
1.		6810	Real estate activities with own or leased property
1.		6810	Real estate activities with own or leased property
1.		6820	Real estate activities on a fee or contract basis
1.		6820	Real estate activities on a fee or contract basis
2.	Virksemi innan tænastuveiting av mat- og drykkjuvørum	5610	Restaurants and mobile food service activities
2.		5629	Other food service activities
2.		5630	Beverage serving activities
3.	Ferðafólkaflutningur á jarnbreyt	4911	Passenger rail transport, interurban
4.	Ferðafólkaflutningur á vegi	4922	Other passenger land transport
4.		4922	Other passenger land transport
5.	Sjóvegis ferðafólkaflutningur	5011	Sea and coastal passenger water transport
5.		5021	Inland passenger water transport
6.	Loftvegis ferðafólkaflutningur	5110	Passenger air transport
7.	Útleigan av akførum	7710	Renting and leasing of motor vehicles
7.		7710	Renting and leasing of motor vehicles
8.	Virksemi innan ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur	7911	Travel agency activities
8.		7912	Tour operator activities
8.		7990	Other reservation service and related activities
9.	Virksemi innan mentan	9000	Creative, arts and entertainment activities
9.		9000	Creative, arts and entertainment activities
9.		9000	Creative, arts and entertainment activities
9.		9000	Creative, arts and entertainment activities
9.		9102	Museums activities and operation of historical sites and buildings
9.		9102	Museums activities and operation of historical sites and buildings
9.		9103	Botanical and zoological gardens and nature reserves activities
10.	Virksemi innan ítrótt og frítíð	7721	Renting and leasing of recreational and sports goods
10.		9200	Gambling and betting activities
10.		9311	Operation of sports facilities
10.		9311	Operation of sports facilities
10.		9319	Other sports activities
10.		9321	Activities of amusement parks and theme parks

6.6 VINNUGREINAFLOKKING – ISIC OG NACE

Hagstova Føroya fylgir leistinum hjá Eurostat, sum ikki brúkar ISIC-vinnugreinaflokkingina, men eina líknandi vinnugreinaflokking, sum verður nevnd NACE. Alt virksemið hjá fyritøkum í Føroyum er flokkað eftir NACE. Í sambandi við hesa forkanningina er eitt arbeiði gjørt við at gera ISIC-vinnugreinarnar um til NACE-vinnugreinar. Sí yvirlit á næstu síðu.

Annex 3 úr IRTS2008 s. 111-112						
List of tourism characteristic activities (tourism industries) and grouping by main categories according to ISIC Rev. 4						
		ISIC rev. 4	ISIC Description	NACE rev2 4 digit	NACE frágreiðing	NACE Description
1.	Accomodation for visitors	5510	Short term accomodation	5510	Hotel og líknandi gistingarstøð	Hotels and similar accommodation
1.	Accomodation for visitors	5510	Short term accomodation	5520	Frítíðarbústaðir o.l., har steðgurin vanliga er styttri	Holiday and other short-stay accommodation
1.	Accomodation for visitors	5520	Camping grounds, recreational vehicle parks and trailer parks	5530	Tjaldingarpláss	Camping grounds, recreational vehicle parks and trailer parks
1.	Accomodation for visitors	5590	Other accommodation	5590	Onnur gistingarstøð	Other accommodation
1.	Accomodation for visitors	6810	Real estate activities with own or leased property	6810	Keyp og søla av egnum fastognum	Buying and selling of own real estate
1.	Accomodation for visitors	6810	Real estate activities with own or leased property	6820	Útleiga og rakstur av egnum ella langleigaðum ognur	Renting and operating of own or leased real estate
1.	Accomodation for visitors	6820	Real estate activities on a fee or contract basis	6831	Húsameklarar	Real estate agencies
1.	Accomodation for visitors	6820	Real estate activities on a fee or contract basis	6832	Umiting av fastognum fyri samsýning ella sambært s	Management of real estate on a fee or contract basis
2.	Food- and beverage-serving services	5610	Restaurants and mobile food service activities	5610	Matstovur, matútbering og gøtumatur	Restaurants and mobile food service activities
2.	Food- and beverage-serving services	5629	Other food service activities	5629	Annað matstovuvirksemi	Other food service activities
2.	Food- and beverage-serving services	5630	Beverage serving activities	5630	Vertshús, kaffistovur, dansistøð v.m.	Beverage serving activities
3.	Railway passenger transport	4911	Passenger rail transport, interurban	4910	Ferðafólkaflutningur við toki millum býir	Passenger rail transport, interurban
4.	Road passenger transport	4922	Other passenger land transport	4932	Hýruvognar	Taxi operations
4.	Road passenger transport	4922	Other passenger land transport	4939	Annar flutningur av ferðafólki á landi	Other passenger land transport n.e.c.
5.	Water passenger transport	5011	Sea and coastal passenger water transport	5010	Ferðafólkaflutningur millumlanda og við strandferðs	Sea and coastal passenger water transport
5.	Water passenger transport	5021	Inland passenger water transport	5030	Ferðafólkaflutningur á áum og vøtnum	Inland passenger water transport
6.	Air passenger transport	5110	Passenger air transport	5110	Ferðafólkaflutningur loftvegis	Passenger air transport
7.	Transport equipment rental	7710	Renting and leasing of motor vehicles	7711	Útleiging og langleiga av bilum og øðrum løttum mot	Renting and leasing of cars and light motor vehicles
7.	Transport equipment rental	7710	Renting and leasing of motor vehicles	7712	Útleiging og langleiga av lastbilum	Renting and leasing of trucks
8.	Travel agencies and other reservation services activities	7911	Travel agency activities	7911	Ferðaskrivstovur	Travel agency activities
8.	Travel agencies and other reservation services activities	7912	Tour operator activities	7912	Ferðasmiðir	Tour operator activities
8.	Travel agencies and other reservation services activities	7990	Other reservation service and related activities	7990	Aðrar ferðabíleggingartænastur o.l.	Other reservation service and related activities
9.	Cultural activities	9000	Creative, arts and entertainment activities	9001	Palllist	Performing arts
9.	Cultural activities	9000	Creative, arts and entertainment activities	9002	Stuðulstænastur í sambandi við palllist	Support activities to performing arts
9.	Cultural activities	9000	Creative, arts and entertainment activities	9003	Skapandi list	Artistic creation
9.	Cultural activities	9000	Creative, arts and entertainment activities	9004	Rakstur av sjónleikarhúsum og konserthøllum, ment	Operation of arts facilities
9.	Cultural activities	9102	Museums activities and operation of historical sites and buildir	9102	Museum	Museums activities
9.	Cultural activities	9102	Museums activities and operation of historical sites and buildir	9103	Søgulig støð og bygningar og líknandi støð, sum eru v	Operation of historical sites and buildings and similar visitor attractions
9.	Cultural activities	9103	Botanical and zoological gardens and nature reserves activities	9104	Plantufrøðiligir garðar, djóragarðar og vard náttúruøl	Botanical and zoological gardens and nature reserves activities
10.	Sports and recreational activities	7721	Renting and leasing of recreational and sports goods	7721	Útleiging og langleiga av vørum til frítíðar- og ítróttar	Renting and leasing of recreational and sports goods
10.	Sports and recreational activities	9200	Gambling and betting activities	9200	Vedding og eydnuspøl	Gambling and betting activities
10.	Sports and recreational activities	9311	Operation of sports facilities	9311	Rakstur av ítróttaøkjum	Operation of sports facilities
10.	Sports and recreational activities	9311	Operation of sports facilities	9313	Venjingarmiðstøðir	Fitness facilities
10.	Sports and recreational activities	9319	Other sports activities	9319	Annað innan ítrótt	Other sports activities
10.	Sports and recreational activities	9321	Activities of amusement parks and theme parks	9321	Stuttleikagarðar o.l.	Activities of amusement parks and theme parks
10.	Sports and recreational activities	9329	Other amusement and recreation activities n.e.c.	9329	Annað undirhald og frítíðarvirksemi	Other amusement and recreation activities
10.	Sports and recreational activities					
11.	Retail trade of country-specific tourism characteristic goods		Duty free shops			
11.	Retail trade of country-specific tourism characteristic goods		Specialized retail trade of souvenirs			
11.	Retail trade of country-specific tourism characteristic goods		Specialized retail trade of handicrafts			
11.	Retail trade of country-specific tourism characteristic goods		Other specialized retail trade of tourism characteristic goods			
11.	Retail trade of country-specific tourism characteristic goods					
12.	Other country-specific tourism characteristic activities					

Annex 3 úr IRTS2008 s. 111-112

List of tourism characteristic activities (tourism industries) and grouping by main categories according to ISIC Rev. 4

		ISIC rev. 4	ISIC Description	NACE rev2 4 digit	NACE frágreiðing	NACE Description
1.	Accomodation for visitors	5510	Short term accomodation	5510	Hotel og líknandi gistingarstað	Hotels and similar accommodation
1.	Accomodation for visitors	5510	Short term accomodation	5520	Frítíðarbústaðir o.l., har steðgurin vanliga er styttri	Holiday and other short-stay accommodation
1.	Accomodation for visitors	5520	Camping grounds, recreational vehicle parks and trailer parks	5530	Tjaldingarpláss	Camping grounds, recreational vehicle parks and trailer parks
1.	Accomodation for visitors	5590	Other accommodation	5590	Onnur gistingarstað	Other accommodation
1.	Accomodation for visitors	6810	Real estate activities with own or leased property	6810	Keyp og søla av egnum fastognum	Buying and selling of own real estate
1.	Accomodation for visitors	6810	Real estate activities with own or leased property	6820	Útleiga og rakstur av egnum ella langleigaðum ognur	Renting and operating of own or leased real estate
1.	Accomodation for visitors	6820	Real estate activities on a fee or contract basis	6831	Húsameklarar	Real estate agencies
1.	Accomodation for visitors	6820	Real estate activities on a fee or contract basis	6832	Umiting av fastognum fyri samsýning ella sambært s	Management of real estate on a fee or contract basis
2.	Food- and beverage-serving services	5610	Restaurants and mobile food service activities	5610	Matstovur, matútbering og gøtumatur	Restaurants and mobile food service activities
2.	Food- and beverage-serving services	5629	Other food service activities	5629	Annað matstovuvirksemi	Other food service activities
2.	Food- and beverage-serving services	5630	Beverage serving activities	5630	Vertshús, kaffistovur, dansistað v.m.	Beverage serving activities
3.	Railway passenger transport	4911	Passenger rail transport, interurban	4910	Ferðafólkaflutningur við toki millum býir	Passenger rail transport, interurban
4.	Road passenger transport	4922	Other passenger land transport	4932	Hýruvognar	Taxi operations
4.	Road passenger transport	4922	Other passenger land transport	4939	Annar flutningur av ferðafólki á landi	Other passenger land transport n.e.c.
5.	Water passenger transport	5011	Sea and coastal passenger water transport	5010	Ferðafólkaflutningur millumlanda og við strandferðs	Sea and coastal passenger water transport
5.	Water passenger transport	5021	Inland passenger water transport	5030	Ferðafólkaflutningur á áum og vatnum	Inland passenger water transport
6.	Air passenger transport	5110	Passenger air transport	5110	Ferðafólkaflutningur loftvegis	Passenger air transport
7.	Transport equipment rental	7710	Renting and leasing of motor vehicles	7711	Útleiging og langleiga av bilum og øðrum løttum mot	Renting and leasing of cars and light motor vehicles
7.	Transport equipment rental	7710	Renting and leasing of motor vehicles	7712	Útleiging og langleiga av lastbilum	Renting and leasing of trucks
8.	Travel agencies and other reservation services activities	7911	Travel agency activities	7911	Ferðaskrivstovur	Travel agency activities
8.	Travel agencies and other reservation services activities	7912	Tour operator activities	7912	Ferðasmiðir	Tour operator activities
8.	Travel agencies and other reservation services activities	7990	Other reservation service and related activities	7990	Aðrar ferðabileggingartænastur o.l.	Other reservation service and related activities
9.	Cultural activities	9000	Creative, arts and entertainment activities	9001	Palllist	Performing arts
9.	Cultural activities	9000	Creative, arts and entertainment activities	9002	Stuðulstænastur í sambandi við palllist	Support activities to performing arts
9.	Cultural activities	9000	Creative, arts and entertainment activities	9003	Skapandi list	Artistic creation
9.	Cultural activities	9000	Creative, arts and entertainment activities	9004	Rakstur av sjónleikarhúsum og konserthøllum, ment	Operation of arts facilities
9.	Cultural activities	9102	Museums activities and operation of historical sites and buildir	9102	Museum	Museums activities
9.	Cultural activities	9102	Museums activities and operation of historical sites and buildir	9103	Søgulig stað og bygningar og líknandi stað, sum eru v	Operation of historical sites and buildings and similar visitor attractions
9.	Cultural activities	9103	Botanical and zoological gardens and nature reserves activities	9104	Plantufrøðiligir garðar, djóragarðar og vard náttúruøl	Botanical and zoological gardens and nature reserves activities
10.	Sports and recreational activities	7721	Renting and leasing of recreational and sports goods	7721	Útleiging og langleiga av vørum til frítíðar- og ítróttar	Renting and leasing of recreational and sports goods
10.	Sports and recreational activities	9200	Gambling and betting activities	9200	Vedding og eydnuspøl	Gambling and betting activities
10.	Sports and recreational activities	9311	Operation of sports facilities	9311	Rakstur av ítróttaøkjum	Operation of sports facilities
10.	Sports and recreational activities	9311	Operation of sports facilities	9313	Venjingarmiðstøðir	Fitness facilities
10.	Sports and recreational activities	9319	Other sports activities	9319	Annað innan ítrótt	Other sports activities
10.	Sports and recreational activities	9321	Activities of amusement parks and theme parks	9321	Stuttleikagarðar o.l.	Activities of amusement parks and theme parks
10.	Sports and recreational activities	9329	Other amusement and recreation activities n.e.c.	9329	Annað undirhald og frítíðarvirksemi	Other amusement and recreation activities
10.	Sports and recreational activities					
11.	Retail trade of country-specific tourism characteristic goods		Duty free shops			
11.	Retail trade of country-specific tourism characteristic goods		Specialized retail trade of souvenirs			
11.	Retail trade of country-specific tourism characteristic goods		Specialized retail trade of handicrafts			
11.	Retail trade of country-specific tourism characteristic goods		Other specialized retail trade of tourism characteristic goods			
11.	Retail trade of country-specific tourism characteristic goods					
12.	Other country-specific tourism characteristic activities					

7 DÁTUKELDUR

Í hesum parti verða dátukeldur, sum skulu brúkast sum grundarlag undir talvunum í Regional Tourism Satellite Account, lýstar. Víst verður til høvuðsuppritið fyri nærri lýsing av ymisku keldunum.

7.1 SPURNAKANNINGIN TIL FØROYSKAR FERÐAVINNUVEITARAR

Spurnakanningin til føroyskar ferðavinnuveitarar, sum er grundarlagið undir árligu búskaparískoytiskanningini, skal víðkast, soleiðis at svarini skulu býtast út á arbeiðsstøð, tá ið fleiri arbeiðsstøð eru í somu fyritøku. Hetta merkir, at ferðavinnufyritøkur, sum hava fleiri arbeiðsstøð, ikki einans svara spurningum fyri alla fyritøkuna, men at fyritøkan svarar fyri hvørt arbeiðsstað.

Ein av møguleikunum fyri at gera eitt nú virðisøking, framleiðslu og nýtslu upp fyri hvørt arbeiðsstað hjá einari fyritøku er at spyrja fyritøkuna um nýtslu í framleiðsluni (útreiðslur, sum ikki eru lønir) og sølu fyri hvørt arbeiðsstað. Ein annar møguleiki er at gera eins og gjørt verður í Danmarks statistik, har virðisøkingin og sølan fyri hvørt arbeiðsstað verður gjørd upp við støði í einum býtislykli. Hesin býtislykil kann eitt nú vera tal av ársverkum ella starvssetanum á einum arbeiðsstaði. Virðisøkingin og sølan fyri arbeiðsstaðið verður gjørd upp við at býta talið av ársverkum ella starvssetanum á arbeiðsstaðnum við samlaðu virðisøkingina og søluna hjá fyritøkuni.

7.2 SPURNAKANNINGIN TIL FERÐAFÓLK

Tá ið farið verður undir at gera eina spurnakanning til ferðafólk, ber til at víðka hesa, soleiðis at spurt verður um nýtslu, gisting og ferðahátt eftir øki. Hetta stuðlar serliga undir talvu 10b.

7.3 ROKNSKAPARSKIPANIN

Hagstova Føroya fær upplýsingar um eitt nú sølu og útreiðslur hjá privatum fyritøkum úr roknskaparskipanini. Roknskaparskipanin er høvuðsgrundarlagið undir upplýsingunum um virðisøking og nýtslu hjá fyritøkum. Upplýsingar úr roknskaparskipanini um virðisøking og nýtslu hjá einari fyritøku kunnu við einum býtislykli býtast út á arbeiðsstøðini hjá fyritøkuni.

7.4 GISTINGARSKIPANIN

Gistingarskipanin savnar inn upplýsingar frá gistingarstøðum um persónsgistingarnætur, kapasitet á gistingarhúsum og nýtslustig av kømrum og sengrum. Gistingarskipanin er grundarlagið undir gistingarhagtølunum, sum verða útgivin mánaðarliga. Gistingarnætur verða flokkaðar eftir bústaðarlandi og slagi av gisting. Harumframt verða tey gistandi býtt upp í frítíðarferðafólk og vinnuferðafólk umframt bólkar og einstaklingar.

Í sambandi við menning av TSA er viðmælt, at gistingarskipanin skal tillagast og víðkast til at kunna veita størri part av grundarlagnum undir talvu 10, sum lýsir ikki-peningaligar ávísar.

Gistingarskipanin skal eisini tillagast til arbeiðið við RTSA. Øll gistingarstøð skulu hava eina sonevnda adressukotu í gistingarskipanini, sum verður nevnt eitt L-tal.

7.5 UPPGERÐ AV FERÐANDI, SUM FERÐAST SJÓVEGIS

Fyri at økisbýta uppgerð av teimum, sum ferðast sjóvegis, er tørvur á at fáa upplýsingar frá einstøku havnunum kring landið, soleiðis at ferðandi sjóvegis kunnu gerast upp á øki.

7.6 VIRKISSKRÁIN

Ein virkisskrá inniheldur alskyns upplýsingar um fyritøkur í Føroyum, so sum navn á fyritøku, eigarar, virkishátt og vinnugrein. Ein nýggj virkisskrá verður í løtuni ment hjá Talgildu Føroyum í samstarvi við Hagstovu Føroya, TAKS og Skráseting Føroya. Virkisskráin fer eisini at innihalda upplýsingar um arbeiðsstøð hjá fyritøkum. Tá ið arbeiðsstøðini eru ásett, ber til at knýta upplýsingar at arbeiðsstøðum hjá fyritøkum. Hetta merkir til dømis, at løntakarar og ársverk kunnu knýtast at einum arbeiðsstaði.

7.7 LØN OG ARBEIÐSTÍÐ

Skipanin Løn og arbeiðstíð inniheldur m.a. upplýsingar um arbeiðstíð, ársverk og starvsheiti hjá føroyskum løntakarum. Hagstova Føroya fær upplýsingar frá einum stórum parti av føroyskum arbeiðsgevarum mánaðarliga. Hetta ger tað møguligt at gera mánaðarlig hagtøl fyri tær talvur, sum brúka hesa kelduna sum grundarlag. Tá ið virkisskráin er liðugt ment og inniheldur arbeiðsstøð hjá fyritøkum, ber til at knýta upplýsingar um løntakarar at arbeiðsstøðum hjá fyritøkum, so sum ársverk og starvsheiti.

Tá ið hendan skipanin fevnir um allar føroyskar arbeiðsgevarar, ber til at brúka upplýsingar úr skipanini til at økisbýta talvu 7 og 10d. Eisini ber til at brúka upplýsingar úr skipanini sum býtislykil fyri at býta virðisøking og nýtslu út á arbeiðsstøð.

7.8 HAGTALSSKIPANIN FYRI ALMENNA GEIRAN

Hagtalsskipanin fyri almenna geiran, sum stavar frá upplýsingum úr Búskaparskipan landsins hjá Gjaldstovuni, hevur m.a. upplýsingar um útreiðslur hjá tí almenna. Mett verður, at hendan skipanin við ávísari menning kann veita økisbýttar upplýsingar til talvu 9, sum lýsir almennu felagsnýtsluna í ferðavinnuni. Harumframt kann skipanin veita ein part av økisbýttu upplýsingunum til talvu 8, sum lýsir samlaða virðið av íløgum í ferðavinnuni. Hóast talva 8 og 9 ikki verða raðfestar í fyrstu syftu, verður hendan keldan viðkomandi, um valt verður at víðka RTSA við hesum báðum talvunum.

7.9 GJALDSKORTSDÁTUR

Gjaldskortsnýtsla verður mett at vera millum mest neyðugu keldur í øllum Norðurlondum fyri at gera dygdargóð ferðavinnuhagtøl. Í sambandi við økisbýtt ferðavinnuhagtøl er størsta avbjóðingin at tryggja, at terminalar verða knýttir at rætta arbeiðsstaði. Ein avbjóðing í dag er, at sama fyritøka, sum hevur fleiri arbeiðsstøð, ofta brúkar somu terminalar ymisk støð í landinum. Hetta kann merkja, at eitt keyp í Runavík stendur skrásett sum eitt keyp í Tórshavn.

Gjaldskortsdátur kunnu eisini vera viðkomandi fyri at gera nýtsluna upp innan innlendis ferðavinnu. Fyri at kunna gera haldgóð hagtøl um økisbýtta innlendis ferðavinnu, skal kannast nærri, um tað er ein møguleiki at knýta persónsdátur at føroyskum gjaldskortsdátum. Við hesum kann staðfestast, um ein persónur keypir ferðavinnuvørur- og tænastur uttan fyri sítt vanliga umhvørvi.

Ein avbjóðing í fleiri talvum er at býta ferðafólk upp í eindagsvitjandi og ferðafólk, sum gista. Um gjaldskortsdáturnar fáa atknýttar persónsupplýsingar, kunnu hesar nýtast til at skyna ímillum eindagsvitjandi og vitjandi, sum gista. Hetta kann gerast við at máta gjaldskortskeyp. Um ein persónur bara ger gjaldskortskeyp í einum øki í ein dag, verður hann mettur at vera eindagsvitjandi.

Um ein persónur ger gjaldskortskeyp í einum øki fleiri dagar á rað, verður hann mettur at vera vitjandi, sum gistir.

7.10 EUROSTAT: AIRBNB, TRIPADVISOR, EXPEDIA OG BOOKING.COM

Tað hevur í fleiri ár verið ein avbjóðing hjá hagstovum og ferðavinnuráðum kring heimin at fáa atgongd til dátur um Airbnb og aðra privata gisting. Í 2021 fingu hagstovurnar, sum eru partur av Eurostat-samstarvinum, atgongd til gistingarupplýsingar frá Airbnb, Tripadvisor, Expedia og booking.com. Hendan keldan skal geva hagstovum betri vitan um privata gisting og hon stuðlar serliga undir allar talvurnar í talvu 10 (ikki-peningaligir ávísar).

Um Hagstova Føroya, sum ikki er partur av Eurostat, fær fatur á upplýsingum úr hesari keldur, verður ein partur av kanningararbeiðnum at staðfesta, um upplýsingar frá hesari kelduni eru býttar á adressur fyri at kunna gera gistingar upp á øki. Tað fer at krevja, at allar skrásettar adressur í kelduni skulu gerast um til eitt L-tal (adressukota).

8 MÁT

Útgangsstøðið fyri Regional Tourism Satellite Account eru tær 10 talvurnar í Tourism Satellite Account. Áður er lýst, hvørjar talvur verða raðfestar í sambandi við RTSA. Í hesum parti verður hugt eftir, hvørjar talvur kunnu økisbýtast og hvørjar keldur eru grundarlagið undir talvunum. Harumframt verða avbjóðingar við at framleiða ávísar talvur lýstar í stuttum.

Víst verður til høvuðsuppritið fyri nærri lýsing av teimum 10 talvunum.

8.1 YVIRLIT YVIR TÆR 10 TALVURNAR

Tær tíggju talvurnar eru:

1. Nýtsla í inngangandi ferðavinnu
2. Nýtsla í innlendis ferðavinnu
3. Nýtsla í útgangandi ferðavinnu
4. Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu
5. Framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum
6. Ferðavinnan í búskapinum
7. Starvssetanir í ferðavinnuni
8. Samlaða virðið av íløgum í ferðavinnuni
9. Almenna felagsnýtslan innan ferðavinnu
10. Ikki-peningaligir ávísar

STUTT LÝSING AV TALVUNUM

Nýtslan hjá ferðafólkum í ávikavist inngangandi, innlendis og útgangandi ferðavinnu verður gjørd upp í talvunum 1-3.

Talva 4 er ein samanlegging av talvu 1 og 2, t.v.s. inngangandi og innlendis nýtsla tilsamans.

Talva 5 vísir framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum, sum verða framleiddar til ferðavinnuna.

Talva 6 er høvuðstalvan í Tourism Satellite Account og lýsir ferðavinnuna í búskapinum.

Talva 7 lýsir starvssetanir innan ferðavinnuna, ímeðan talva 8 og 9 vísa samlaða virðið av íløgum í ferðavinnu og almennu felagsnýtsluna í ferðavinnuni.

Talva 10 vísir ikki-peningaligar ávísar innan ferðavinnu.

Talvurnar, sum verða vístar, eru týddar til føroyskt úr enskum og eru uppsettar á neyvt sama hátt sum í handbókini *Tourism Satellite Account: Recommended Methodological Framework 2008.*

8.2 TALVA 1 – NÝTSLA Í INNGANGANDI FERÐAVINNU

STUTT UM TALVU

Talva 1 lýsir nýtslu í inngangandi ferðavinnu. Tað vil í sambandi við økisbýtt ferðavinnuhagtøl siga, hvussu nógvan pening ferðafólk úr øðrum londum brúka upp á vørur og tænastur í einum ávísum øki í Føroyum.

METING

Mett verður, at tað ber til at økisbýta talvu 1 í mun til vørur og slag av ferðafólkum.

KELDUR TIL TALVU 1

Høvuðskeldur til økisbýting av talvu 1 eru ein víðkað spurnakanning til ferðavinnuveitarar umframt gjaldskortsdátur.

AVBJÓÐINGAR

Ein avbjóðing verður væntandi at býta ferðafólk upp í eindagsvitjandi og ferðafólk, sum gista. Eindagsvitjandi í inngangandi ferðavinnu eru væntandi cruiseferðafólk í flestu førum.

Talva 1 - Nýtsla í inngangandi ferðavinnu

býtt á vørur og sløg av vitjandi

Vørur	Nýtsla í inngangandi ferðavinnu		
	Ferðafólk (vitjandi, sum gista) (1.1)	Eindagsvitjandi (1.2)	Vitjandi tilsamans (1.3) = (1.1) + (1.2)
Tilsamans			
A. Nýtsluvørur			
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur			
1. Gistingartænastur til vitjandi		X	
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfatað ar av 1.b		X	
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum		X	
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur			
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt			
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi			
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning			
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning			
7. Tænastur innan útleigan av akførum			
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bileggingartænastur			
9. Mentanarligar tænastur			
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð			
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið			
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið			
A.2. Aðrar nýtsluvørur			
B.1. Virðislutir			

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

8.3 TALVA 2 – NÝTSLA Í INNLENDIS FERÐAVINNU

STUTT UM TALVU

Talva 2 lýsir nýtslu í innlendis ferðavinnu. Tað vil siga, hvussu nógvan pening ferðafólk, sum búgva í Føroyum og ferðast í egnum landi, brúka upp á ferðavinnuvørur og -tænastur. Í sambandi við økisbýtt ferðavinnuhagtøl lýsir talva 2, hvussu nógvan pening innlendis ferðafólk brúka í einum ávísum øki ella hvussu nógvan pening ferðafólk úr einum øki brúka í øðrum økjum.

METING

Talvan verður økisbýtt grundað á nýtsluøki og ikki uppá bústað hjá ferðafólki. Tað vil siga, at mátað verður til dømis, hvussu nógv verður brúkt í ferðavinnuni í Suðuroy, men ikki hvussu nógv ferðafólk úr Suðuroy brúka í til dømis Tórshavn.

KELDUR

Høvuðskeldur til at økisbýta talvu 2 verða ein víðkað spurnakanning til ferðavinnuveitarar umframt gjaldskortsdátur. Fyri at kunna gera haldgóð hagtøl um økisbýtta innlendis ferðavinnu, skal kannast nærri, um tað er ein møguleiki at knýta persónsdátur at føroyskum gjaldskortsdátum, soleiðis at staðfestast kann, um ein persónur keypir ferðavinnuvørur- og tænastur uttan fyri sítt vanliga umhvørvi. Eisini er ein møguleiki at biða ferðavinnuveitarar meta um søluna til føroysk ferðafólk í sambandi við spurnakanningina til ferðavinnuveitarar.

AVBJÓÐINGAR

Ein avbjóðing verður væntandi at býta ferðafólk upp í eindagsvitjandi og ferðafólk, sum gista.

Talva 2 - Nýtsla í innlendis ferðavinnu

býtt á vørur, sløg av vitjandi og sløg av ferðum

Vørur	Nýtsla í innlendis ferðavinnu								
	Innlendis ferðir			Útgangandi ferðir			Øll sløg av ferðum		
	Ferðafólk (vitjandi, sum gista)	Eindagsvitjandi (2.2)	Vitjandi tilsamans (2.3) = (2.1) + (2.2)	Ferðafólk (vitjandi, sum gista) (2.4)	Eindagsvitjandi (2.5)	Vitjandi tilsamans (2.6) = (2.4) + (2.5)	Ferðafólk (vitjandi, sum gista) (2.7) = (2.1) + (2.4)	Eindagsvitjandi (2.8) = (2.2) + (2.5)	Vitjandi tilsamans (2.9) = (2.3) + (2.6)
Tilsamans									
A. Nýtsluvørur									
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur									
1. Gistingartænastur til vitjandi		X			X			X	
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfatað av 1.b		X			X			X	
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av fritiðarhúsum, sum t.d. summarhúsum		X			X			X	
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur									
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt									
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi									
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning									
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning									
7. Tænastur innan útleigan av akførum									
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur									
9. Mentanarligar tænastur									
10. Tænastur innan ítrótt og fritið									
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið									
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið									
A.2. Aðrar nýtsluvørur									
B.1. Virðislutir									

Keldu: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

8.4 TALVA 3 – NÝTSLA Í ÚTGANGANDI FERÐAVINNU

Talva 3 lýsir nýtslu í útgangandi ferðavinnu. Í sambandi við økisbýtt ferðavinnuhagtøl vil tað siga, hvussu nógvan pening ferðafólk úr ávísum økjum í Føroyum brúka upp á vørur og tænastur í sambandi við ferðavinnuferðir uttanlands.

Talva 3 verður ikki raðfest í sambandi við økisbýtt ferðavinnuhagtøl, tí hon verður ikki mett at hava eins stóran týdning sum hinar talvurnar. Talva 3 verður heldur ikki raðfest í framleiðsluni av RTSA í øðrum londum.

Talva 3 - Nýtsla í útgangandi ferðavinnu

býtt á vørur og sløg av vitjandi

Vørur	Nýtsla í útgangandi ferðavinnu		
	Ferðafólk (vitjandi, sum gista) (3.1)	Eindagsvitjandi (3.2)	Vitjandi tilsamans (3.3) = (3.1) + (3.2)
Tilsamans			
A. Nýtsluvørur			
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur			
1. Gistingartænastur til vitjandi		X	
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b		X	
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum		X	
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur			
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt			
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi			
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning			
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning			
7. Tænastur innan útleigan av akførum			
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur			
9. Mentanarligar tænastur			
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð			
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið			
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið			
A.2. Aðrar nýtsluvørur			
B.1. Virðislutir			

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

8.5 TALVA 4 – NÝTSLA Í INNANHÝSIS FERÐAVINNU

Í talvu 4 verður nýtslan í inngangandi ferðavinnu (talva 1) og nýtslan í innlendis ferðavinnu (talva 2) løgd saman. Hetta tilsamans verður nevnt nýtsla í innanhýsis ferðavinnu.

Afturat hesum kemur onnur nýtsla í ferðavinnu. Hetta eru ymiskar tænastur, sum ikki verða beinleiðis uppgjørdar, men sum skulu telja sum nýtsla.

METING

Av tí at meginparturin av talvu 4 er ein samanlegging av talvu 1 og 2, ber til at framleiða hesa talvuna, tá ið talva 1 og 2 verða framleiddar.

Talva 4 - Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu

býtt á vørur

Vørur	Nýtsla í innhýsis ferðavinnu			Onnur nýtsla í ferðavinnu (4.2)	Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu tilsamans (4.3) = (4.1) + (4.2)
	Nýtsla í inngangandi ferðavinnu (1.3)	Nýtsla í innlendis ferðavinnu (2.9)	Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu (4.1) = (1.3) + (2.9)		
Tilsamans					
A. Nýtsluvørur					
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur					
1. Gistingartænastur til vitjandi					
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfatað av 1.b					
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum					
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur					
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt					
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi					
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning					
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning					
7. Tænastur innan útleigan av akførum					
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur					
9. Mentanarligar tænastur					
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð					
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið					
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið					
A.2. Aðrar nýtsluvørur					
B.1. Virðislutir					

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

8.6 TALVA 5 – FRAMLEIÐSLUVIRÐIÐ Á FERÐAVINNUVØRUM OG -TÆNASTUM

STUTT UM TALVU

Talva 5 lýsir samlaða virðið á vørum og tænastum, sum hvør einstøk vinnugrein innan ferðavinnu framleiðir. Dømi um hetta er samlaða virðið á framleiddum vørum og tænastum innan veiting av mati og drykkjuvørum í Føroyum.

METING

Mett verður, at tað ber til at økisbýta talvu 5, men tað er møguliga ein avbjóðing at gera upp á vørur. Í Íslandi verður talva 5 gjørd upp á vinnugreinar og mælt verður til at gera tað sama í Føroyum í sambandi við framleiðslu av RTSA.

KELDUR TIL TALVU

Mett verður, at ein høvuðskelda verður roknskaparskipanin hjá Hagstovu Føroya. Roknskapirnir verða grundarlagið undir at gera framleiðsluvirðið upp og eftir hetta skulu úrslitini býtast út á støð. Hetta verður gjørt við víðkaðu spurnakanningini til ferðavinnuveitarar, har spurt verður beinleiðis um framleiðsluvirðið hjá hvørjum arbeiðsstaði í fyritøkuni. Til ber eisini at brúka upplýsingar um ársverk sum býtislykil til at býta framleiðsluvirðið hjá fyritøkuni út á arbeiðsstøð.

Talva 5 - Framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum

Framleiðslukonta fyri ferðavinnu og aðrar vinnur undir einum (í støðisprísum)

Vørur	Vinnugreinar innan ferðavinnu						
	1. Gistingartænastur til vitjandi (5.1)	1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b (5.1a)	1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum (5.1b)	2. Vinnugreinar innan tænastuveiting av mat- og drykkjuvørum (5.2)	3. Ferðafólkaflutningur á jarnbreyt (5.3)	4. Ferðafólkaflutningur á vegi (5.4)	5. Sjóvegis ferðafólkaflutningur (5.5)
Tilsamans							
A. Nýtsluvørur							
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur							
1. Gistingartænastur til vitjandi							
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b							
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum							
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur							
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt							
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi							
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning							
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning							
7. Tænastur innan útleigan av akførum							
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur							
9. Mentanarligar tænastur							
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð							
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið							
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið							
A.2. Aðrar nýtsluvørur							
B. Ikki-nýtsluvørur							
B.1. Virðislutir							
B.2. Aðrar ikki-nýtsluvørur							
I. Framleiðsluvirði tilsamans (í støðisprísum)							
II. Tilfarsnýtsla tilsamans (í marknaðarprísum)							
(I – II). Bruttovirðisøking tilsamans (í støðisprísum)							
Lønir og atknýtt gjøld							
Aðrir framleiðsluskattir (netto)							
Brutto blandað inntøka							
Bruttorakstraravlop							

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

Vinnugreinar innan ferðavinnu									
6. Loftvegis ferðafólkaflutningur (5.6)	7. Útleigan av akførum (5.7)	8. Vinnugreinar innan ferðaskrivstovuvirksemi og aðrar bileggingartænastur (5.8)	9. Mentanarligar vinnugreinar	10. Vinnugreinar innan ítrótt og frítíð (5.10)	11. Smásøla av sermerktum ferðavinnuvørum, sum eru serstakar fyri landið (5.11)	12. Vinnugreinar innan ferðavinnu, sum eru serstakar fyri landið (5.12)	Tilsamans (5.13)	Aðrar vinnugreinar (5.14)	Framleiðsluvirði hjá innlendskum framleiðarum (í støðisprísum) (5.15) = (5.13) + (5.14)

8.7 TALVA 6 – FERÐAVINNAN Í BÚSKAPINUM

Talva 6 lýsir búskaparligu virðisøkingina í ferðavinnuni og hvussu stór henda virðisøkingin er í mun til samlaða búskapin. Talvan lýsir sostatt, hvussu stóran part ferðavinnan fyllir í búskapinum. Í sambandi við økisbýtt ferðavinnuhagtøl lýsir talva 6 búskaparligu virðisøkingina í einum ávísum øki.

METING

Tað ber til at lýsa, hvussu stór virðisøkingin er í mun til samlaða búskapin í Føroyum, men tað ber ikki til at samanbera virðisøkingina í økinum sum part av búskapinum í økinum. Til hetta krevst ein økisbýttur tjóðarroknskapur.

Mett verður, at talva 6 verður gjørd upp á vinnugreinar og ikki vørur.

KELDUR

Høvuðskeldur til økisbýting av talvu 6 verða roknskaparskipanin, ein víðkað spurnakanning til ferðavinnuveitarar og tjóðarroknskapurin.

Talva 6 - Ferðavinnan í búskapinum

Innlendis framleiðsla, innflutningur og innanhýsis ferðavinnunýtsla (í marknaðarprísum)

Vørur	Vinnugreinar innan ferðavinnu							
	1. Gistingartænastur til vitjandi		1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b		1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum		...	
	Framleiðsluvirði (5.1)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5.1a)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5.1b)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5...)	Ferðavinnulutur (í virði)
Tilsamans								
A. Nýtsluvørur								
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur								
1. Gistingartænastur til vitjandi								
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b								
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum								
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur								
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt								
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi								
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning								
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning								
7. Tænastur innan útleigan av akførum								
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur								
9. Mentanarligar tænastur								
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð								
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið								
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið								
A.2. Aðrar nýtsluvørur								
B. Ikki-nýtsluvørur								
B.1. Virðislutir								
B.2. Aðrar ikki-nýtsluvørur								
I. Framleiðsluvirði tilsamans (í støðisprísum)								
II. Tilfarsnýtsla tilsamans (í marknaðarprísum)								
(I – II). Bruttovirðisøking tilsamans (í støðisprísum)								
Lønir og atknýtt gjøld								
Aðrir framleiðsluskattir (netto)								
Brutto blandað inntøka								
Bruttorakstraravlop								

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

12. Vinnugreinar innan ferðavinnu, sum eru serstakar fyri landið		Tilsamans		Aðrar vinnugreinar (5.14)		Framleiðsluvirði hjá innlendskum framleiðarum (í støðisprísum)		Innflutningur	
Framleiðsluvirði (5.12)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5.13)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5.14)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5.15) = (5.13) + (5.14)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (6.1)	Ferðavinnulutur (í virði)

Vøruskattir (netto) á innlendskari framleiðslu og innflutningi		Handils- og flutningsavansur		Innlendsk framleiðsla og innflutningur (í marknaðarprísum)	Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu	Ferðavinnulutfall (%)
Framleiðsluvirði (6.2)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (6.3)	Ferðavinnulutur (í virði)	(6.4) = (5.15) + (6.1) + (6.2) + (6.3)	(4.3)	(6.5) = ((4.3) / (6.4)) x 100
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			

8.8 TALVA 7 – STARVSSETANIR Í FERÐAVINNUNI

Talva 7 lýsir talið av starvssetanum í ferðavinnuni, samlaða talið av arbeiddum tímum í ferðavinnuni og tal av størvum umroknað til fulla tíð í ferðavinnuni.

Teigarnir í talvuni eru býttir upp í kyn og eru harumframt býttir upp í løntakarar og sjálvstøðugt vinnurekandi.

Talva 7 lýsir eisini, hvussu nógvar fyritøkur eru í hvørjari vinnugrein innan ferðavinnu. Tað ber tí til dømis til at síggja, hvussu nógvar fyritøkur veita tænastu innan útleigan av akførum ella veita tænastu innan mat- og drykkjuvørur, so sum matstovur v.m.

METING

Mett verður, at tað ber til at økisbýta talvu 7, treytað av, at spurnakanningin til ferðavinnuveitarar verður víðkað til at fevna um upplýsingar um starvssetanir býtt á arbeiðsstøð.

KELDUR TIL TALVU

Høvuðskeldan til økisbýting av talvu 7 er ein víðkað spurnakanning til ferðavinnuveitarar. Tá ið keldan Løn og arbeiðstíð er liðugt ment, verður møguligt at gera mánaðarlig økisbýtt hagtøl fyri talvu 7.

Talva 7 - Starvssetanir í vinnugreinum innan ferðavinnu

Vinnugreinar innan ferðavinnu	Tal av fyritøkum	Tal av størvum eftir setanarstøðu					
		Løntakarar			Sjálvstøðugt vinnurekandi		
		Menn	Kvinnur	Tilsamans	Menn	Kvinnur	Tilsamans
Tilsamans							
1. Gistingartænastur til vitjandi							
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b							
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum							
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur							
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt							
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi							
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning							
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning							
7. Tænastur innan útleigan av akførum							
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur							
9. Mentanarligar tænastur							
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð							
11. Smásøla av sermerktum ferðavinnuvørum, sum eru serstakar fyri landið							
12. Sermerktar vinnugreinar innan ferðavinnu, sum eru serstakar fyri landið							

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

Tal av arbeiddum tímum eftir setanarstøðu						Tal av størvum umroknað til fulla tíð eftir setanarstøðu					
Løntakarar			Sjálvstøðugt vinnurekandi			Løntakarar			Sjálvstøðugt vinnurekandi		
Menn	Kvinnur	Tilsamans	Menn	Kvinnur	Tilsamans	Menn	Kvinnur	Tilsamans	Menn	Kvinnur	Tilsamans

8.9 TALVA 8 – SAMLAÐA VIRÐIÐ AV ÍLØGUM Í FERÐAVINNUNI

Talva 8 lýsir samlaða virðið av sermerktum íløgum, sum verða gjørdar í ferðavinnuni. Dømi um slíkar íløgur eru gistingarhús, bygningar til matstovur, summarhús við ferðavinnuendamáli umframt bussar, bilar og bátar til ferðafólkaflutning.

Talva 8 verður ikki raðfest í sambandi við økisbýtt ferðavinnuhagtøl, tí hon verður ikki mett at hava eins stóran týdning sum hinar talvurnar. Onnur lond raðfesta heldur ikki talvu 8 í sambandi við RTSA.

Talva 8 - Fastar bruttoíløgur í vinnugreinum innan ferðavinnu og øðrum vinnugreinum

Vørur	Vinnugreinar innan ferðavinnu						
	1. Gistingar-tænastur til vitjandi (8.1)	1.a. Gistingar-tænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b (8.1a)	1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum (8.1b)	2. Vinnugreinar innan tænastuveiting av mat- og drykkjuvørum (8.2)	3. Ferðafólka-flutningur á jarnbreyt (8.3)	4. Ferðafólka-flutningur á vegi (8.4)	5. Sjóvegis ferðafólka-flutningur (8.5)
Tilsamans							
I. Støðisognir, sum eru sermerktar til ferðavinnu							
1. Gisting til vitjandi							
1.1 Gistingarhús og onnur sløg av gistingarstøðum til vitjandi							
1.2 Frítíðarhús, sum t.d. summarhús, við fullum ognarrætti							
1.3 Frítíðarhús, sum t.d. summarhús, við øðrum sløgum av ognarrætti							
2. Aðrir bygningar uttan bústaðarendamál og bygningar, sum serliga eru til ferðavinnu							
2.1 Matstovur og líknandi bygningar við tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur							
2.2 Bygningar og undirstøðukervi til fjarflutning av ferðafólki							
2.3 Bygningar til mentanarligar tænastur og líknandi, sum verða mest brúktar av vitjandi							
2.4 Høli til ítrótt, frítíð og undirhald							
2.5 Onnur høli og bygningar							
3. Útgerð til ferðafólkaflutning við ferðavinnuendamáli							
3.1 Á landi							
3.2 Sjóvegis							
3.3 Loftvegis							
4. Aðrar maskinur og útgerð, sum er sergjørt til framleiðslu av sermerktum ferðavinnuvørum							
5. Ábøtur av jarðarogn, sum verður nýtt til ferðavinnuendamál							
II. Íløgur hjá ferðavinnu í aðrar framleiddar ognir, sum ikki eru serstakar fyri ferðavinnu							
(I + II). Tilsamans							
Skrivlig viðmerking:							
III. Aðrar ikki-figgjarligar ognir							

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

Vinnugreinar innan ferðavinnu									
6. Loftvegis ferðafólka-flutningur (8.6)	7. Útleigan av akførum (8.7)	8. Vinnugreinar innan ferðaskrivstovuvirksemi og aðrar bíleggingartænastur (8.8)	9. Mentanarligar vinnugreinar (8.9)	10. Vinnugreinar innan ítrótt og frítíð (8.10)	11. Smásøla av sermerktum ferðavinnuvørum, sum eru serstakar fyri landið (8.11)	12. Vinnugreinar innan ferðavinnu, sum eru serstakar fyri landið (8.12)	13. Tilsamans (8.13)	Aðrar vinnugreinar (8.14)	Fastar bruttoíløgur í ferðavinnu tilsamans (8.15) = (8.13) + (8.14)

8.10 TALVA 9 – ALMENNA FELAGSNÝTSLAN INNAN FERÐAVINNU

STUTT UM TALVU

Talva 9 lýsir almennu felagsnýtsluna í ferðavinnuni, sum fevnir um almennar tænastur til ferðavinnuna. Dømi um slíkar tænastur er marknaðarføring hjá Visit Faroe Islands og nógvar av tænastunum hjá kunningarstovunum kring landið.

METING

Framleiðsla av talvu 9 verður ikki raðfest í sambandi við økisbýtt ferðavinnuhagtøl, tí at talva 9 verður ikki mett at hava eins stóran týdning sum hinar talvurnar. Onnur lond, sum framleiða RTSA, raðfesta heldur ikki talvu 9.

Talva 9 - Almenn felagsnýtsla innan ferðavinnu

býtt á vørur og almennar geirar

Vørur	Almennir geirar				Skrivlig viðmerking
	Landið (9.1)	Landsøki (9.2)	Kommunur (9.3)	Almenn felagsnýtsla við tilknýti til ferðavinnu (9.4) = (9.1) + (9.2) + (9.3)	Tilfarsnýtsla í vinnugreinum innan ferðavinnu
Tilsamans					
85561 Marknaðarføring av ferðavinnu					
85562 Tænastur hjá kunningarstovum					X
91135 Almennar tænastur innan umsiting í sambandi við útbreiðslu og matveiting, hotell og matstovur					
91136 Almennar tænastur innan umsiting í sambandi við ferðavinnumál					X
Partur av:					
83700 Marknaðarkanningum og kanningum av almannahugsan					X
91260 Tænastum hjá løgreglu og brunaverju					X
92919 Øðrum tænastum innan útbúgving og læru					
92920 Tænastum innan stuðul til útbúgving					

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

8.11 TALVA 10 – IKKI-PENINGALIGIR ÁVÍSAR

Talva 10 lýsir ikki-peningaligar ávísar (á enskum *indicators).* Talvan er sostatt ein uppgerð av mátum innan ferðavinnuna, sum ikki eru peningalig.

Talva 10 er býtt upp í undirtalvurnar 10a, 10b, 10c og 10d:

- Talva 10a lýsir tal av ferðum og gistingum
- Talva 10b lýsir komur og gistingar í inngangandi ferðavinnu
- Talva 10c lýsir tal av gistingarstøðum og kapasitet á gistingarstøðum
- Talva 10d lýsir tal av arbeiðsstøðum í vinnugreinum innan ferðavinnu

8.12 TALVA 10A – TAL AV FERÐUM OG GISTINGUM

STUTT UM TALVU

Talva 10a lýsir tal av ferðum og gistingum. Tølini verða býtt á sløg av ferðavinnu og sløg av vitjandi.

METING

Mett verður, at tað ber til at býta talið av gistingum út á økir við verandi gistingarskipan, tí gistingarhúsini lættliga kunnu knýtast til eina adressu. Eitt fullfíggjað yvirlit yvir økisbýttar gistingar er treytað av, at upplýsingar um gistingar frá øllum sløgum av gistingarstøðum, sum til dømis kamping og ból og biti, verða til taks.

Tað ber í ávísan mun til at økisbýta tal av ferðum. Tal av ferðum verður gjørt upp eftir ferðafólkum, sum gista og eindagsvitjandi. Til ber at økisbýta tal av ferðum hjá teimum, sum gista, tí tal av innskrivingum verður skrásett í gistingarskipanini.

KELDUR TIL TALVU

Høvuðskelda til talvu 10a er gistingarskipanin.

AVBJÓÐINGAR

Mett verður, at tað er torført og kostnaðarmikið at gera tal av ferðum upp hjá eindagsvitjandi. Ein hugsað loysn er at brúka gjaldskortsdátur til at máta ferðir hjá eindagsvitjandi. Hetta kann til dømis vera at telja, hvussu leingi eitt gjaldskort er virkið í einum ávísum øki. Um eitt gjaldskort bara er virkið í einum øki í ein dag, verður hetta mett at vera ein eindagsvitjandi.

Hetta hevur tó fleiri avbjóðingar, tí tað telur bara gjaldskortið og ikki hini, sum møguliga ferðast saman við eigaranum av gjaldskortinum.

Somuleiðis kann ein avbjóðing vera, at eitt ferðafólk býr á einum staði, men ferðast til annað stað fleiri dagar á rað. Hetta kann til dømis vera eitt ferðafólk, sum býr á einum gistingarhúsi í Vágunum og ferðast til Havnar um dagin fleiri dagar á rað. Hetta hevði verið tulkað sum, at ferðafólkið gisti í Havn og ikki bert var eindagsvitjandi í Havn.

Tað er ein avbjóðing at gera upp eindagsvitjandi fyri bæði inngangandi ferðavinnu og innlendis ferðavinnu.

Talva 10a - Tal av ferðum og gistingum

býtt á sløg av ferðavinnu og sløg av vitjandi

	Inngangandi ferðavinna			Innlendis ferðavinna			Útgangandi ferðavinna		
	Ferðafólk (vitjandi, sum gista)	Eindagsvitjandi	Vitjandi	Ferðafólk (vitjandi, sum gista)	Eindagsvitjandi	Vitjandi	Ferðafólk (vitjandi, sum gista)	Eindagsvitjandi	Vitjandi
Tal av ferðum									
Tal av gistingum		X			X			X	

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

8.13 TALVA 10B – INNGANGANDI FERÐAVINNA: KOMUR OG GISTINGAR

STUTT UM TALVU

Talva 10b lýsir komur og gistingar í inngangandi ferðavinnu. Tal av komum og gistingum verður býtt á ferðahættir.

METING

Mett verður, at tað ber til at økisbýta tal av komum eftir øki loftvegis og sjóvegis. Tó kann ein avbjóðing vera at gera tal av komum hjá inngangandi ferðafólki, sum ferðast við tyrlu, tí skynast má ímillum inngangandi ferðafólk og onnur.

Mett verður, at avbjóðingar kunnu vera við at økisbýta tal av komum á landi, tí tað er torført at gera upp. Til dømis skal hvør hýruvognur við ferðafólkum skrásetast, sum ferðast frá einum øki til eitt annað.

Tað er ein avbjóðing at gera tal av gistingum upp eftir ferðahátti. Hetta krevur antin, at gistingarskipanin skrásetir, hvønn ferðahátt ferðafólkið hevur nýtt ella skal spurnakanningin til ferðafólk fevna um spurningar um gisting og ferðahátt eftir øki.

KELDUR TIL TALVU

Fyri at økisbýta uppgerð av teimum, sum ferðast sjóvegis, er tørvur á at fáa upplýsingar frá einstøku havnunum kring landið, soleiðis at ferðandi sjóvegis kunnu gerast upp á øki. Somuleiðis er neyðugt at fáa útgreinaða uppgerð frá tyrlutænastuni.

Tal av gistingum eftir ferðahátti kunnu fáast til vega úr gistingarskipanini, um hon verður víðkað ella úr spurnakanningini til ferðafólk, um hon fevnir um spurningar um gisting og ferðahátt eftir øki.

Talva 10b - Inngangandi ferðavinna: tal av komum og gistingum

býtt á ferðahættir

Vørur	Tal av komum	Tal av gistingum
Tilsamans		
1. Loftvegis		
1.1 Ætlaðar flogferðir		
1.2 Flogferðir, sum ikki eru ætlaðar		
1.3 Privatflogfør		
1.4 Aðrir loftvegis ferðahættir		
2. Sjóvegis		
2.1 Ferðafólkaskip og -ferjur		
2.2 Cruiseskip		
2.3 Stuttleikabátar		
2.4 Aðrir sjóvegis ferðahættir		
3. Á landi		
3.1 Jarnbreyt		
3.2 Ferðafólkabussur ella bussur og annar almennur flutningur á vegi		
(i) Hýruvognar, limusina og privat leiguakfør við bilførara		
(ii) Leiga av manna- ella djórariknum akfari		
3.4 Egið privatakfar (við plássi fyri upp til 8 fólk)		
3.5 Leiguakfør uttan bílagdan førara (upp til 8 fólk)		
3.6 Aðrir ferðahættir á landi (á rossabaki, súkklu, motorsúkklu osfr.)		
3.7 Til gongu		

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

8.14 TALVA 10C – TAL AV GISTINGARSTØÐUM OG KAPASITETUR

STUTT UM TALVU

Talva 10c lýsir tal av gistingarstøðum og kapasitet á gistingarstøðum. Hetta verður býtt á sløg av gisting.

METING

Mett verður, at tað ber til at økisbýta talvu 10c. Eitt fullfíggjað yvirlit yvir økisbýttar gistingar er treytað av, at gistingar frá øllum sløgum av gistingarstøðum, sum til dømis kamping og ból og biti verða til taks.

KELDUR TIL TALVU

Høvuðskeldan til økisbýting av talvu 10c er gistingarskipanin, sum skal víðkast til at fevna um øll sløg av gisting.

Talva 10c - Tal av gistingarstøðum og kapasitetur

býtt á sløg av gisting

	Gisting til vitjandi í ISIC 55			Søla, útleiga og umsiting av fastognum í ISIC 68		
	Stuttíðar gistingarvirksemi	Tjaldstaðir, øki til húsbilar og húsvagnapláss	Onnur sløg av gisting	Útleiga og rakstur av egnum ella langleigaðum ognum	Fastognarvirksemi fyri samsýning ella sambært sáttmála	...
Tal av gistingarstøðum						
Kapasitetur (kømur)						
Kapasitetur (sengur)						
Nýtslustig (kømur)						
Nýtslustig (sengur)						

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

8.15 TALVA 10D – TAL AV ARBEIÐSSTØÐUM Í VINNUGREINUM INNAN FERÐAVINNU

STUTT UM TALVU

Talva 10d lýsir tal av arbeiðsstøðum í vinnugreinum innan ferðavinnu. Talið verður býtt á miðaltal av størvum.

METING

Mett verður, at tað er møguligt at økisbýta talvu 10d.

KELDUR TIL TALVU

Høvuðskeldan til at økisbýta talvu 10d er ein víðkað spurnakanning til ferðavinnuveitarar, har spurt verður um, hvussu nógv arbeiðsstøð eru í fyritøkuni, hvar tey eru og hvussu nógv starvast á hvørjum arbeiðsstaði.

Í løtuni verður ein virkisskrá ment, sum skal innihalda øll arbeiðsstøð hjá fyritøkum. Tá ið virkisskráin er liðugt ment, ber til at fáa upplýsingar um tal av arbeiðsstøðum beinleiðis úr skipanini. Eisini fer at bera til hjá fyritøkum at knýta løntakarar at einum ávísum arbeiðsstaði í sambandi við lønarflytingar. Á tann hátt kann reglulig innsavnan av upplýsingum um tal av løntakarum á arbeiðsstað fáast til vega.

Talva 10d - Tal av arbeiðsstøðum í vinnugreinum innan ferðavinnu

býtt á miðaltal av størvum

	1-4	5-9	10-19	20-49	50-99	100-249	250-499	500-999	>1000	Tilsamans
Tilsamans										
Vinnugreinar innan ferðavinnu										
1. Gistingartænastur til vitjandi										
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar										
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum										
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur										
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt										
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi										
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning										
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning										
7. Tænastur innan útleigan av akførum										
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur										
9. Vinnugreinar innan mentan										
10. Vinnugreinar innan ítrótt og frítíð										
11. Smásøla av sermerktum ferðavinnuvørum, sum eru serstakar fyri landið										
12. Vinnugreinar innan ferðavinnu, sum eru serstakar fyri landið										

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

9 DØMI UM ÚRSLIT

Við støði í talvunum eru nøkur hugsað dømi framleidd fyri at vísa á møguleikarnar við hagtølunum, sum verða framleidd í sambandi við Regional Tourism Satellite Account. Tey dømini verða lýst niðanfyri.

9.1 DØMI: NÝTSLA Í INNGANGANDI FERÐAVINNU – BÝTT Á ØKI

Í døminum niðanfyri verður nýtsla í inngangandi ferðavinnu býtt á sjey øki: Suðurstreymoy, Norðurstreymoy, Norðoyggjar, Eysturoy, Suðuroy, Vágar og Sandoy.



9.2 DØMI: NÝTSLA Í INNANHÝSIS FERÐAVINNU – BÝTT Á ØKI

Innanhýsis ferðavinna er ein samanlegging av inngangandi og innlendis ferðavinnu. Innanhýsis ferðavinna verður lýst í talvu 4.

Dømið niðanfyri lýsir nýtslu í innanhýsis ferðavinnu býtt á økini Suðurstreymoy, Norðurstreymoy, Norðoyggjar, Eysturoy, Suðuroy, Vágar og Sandoy.



9.3 DØMI: NÝTSLA Í INNGANGANDI FERÐAVINNU Í TÓRSHAVN

Í døminum niðanfyri verður víst á nýtsluna í inngangandi ferðavinnu í Tórshavn í árunum frá 2013-2021.



9.4 DØMI: GISTINGAR Á GISTINGARHÚSI EFTIR ENDAMÁLI VIÐ FERÐ

Í gistingarskipanini, sum Hagstova Føroya hevur ment í samstarvi við Visit Faroe Islands, verða ferðafólk, sum gista á gistingarhúsi, býtt upp í vinnuferðafólk og frítíðarferðafólk.

Í døminum niðanfyri verða tøl úr gistingarskipanini víst fyri tal av gistingum á gistingarhúsum í Tórshavn í 2021 býtt á frítíðarferðafólk og vinnuferðafólk.



9.5 DØMI: ÁRSVERK Í INNGANGANDI FERÐAVINNU – BÝTT Á ØKI

Við økisbýttum ferðavinnuhagtølunum fer eisini at bera til at býta ársverk í inngangandi ferðavinnu út á øki. Í døminum niðanfyri eru ársverk í inngangandi ferðavinnu býtt á økini Suðurstreymoy, Norðurstreymoy, Norðoyggjar, Eysturoy, Suðuroy, Vágar og Sandoy.



9.6 DØMI: ÁRSVERK Í INNGANGANDI FERÐAVINNU Í TÓRSHAVN

Tá ið økisbýtt ferðavinnuhagtøl verða framleidd í fleiri ár, ber til at samanbera hagtølini ár fyri ár. Niðanfyri verður víst á eitt dømi, har hugt verður eftir ársverkum í inngangandi ferðavinnu í Tórshavn frá 2013 til 2021.



9.7 NÝTSLA Í INNGANGANDI FERÐAVINNU Í SUÐURSTREYMOY

Í døminum niðanfyri verður nýtslan í inngangandi ferðavinnu í Suðurstreymoy býtt á vinnugreinar innan ferðavinnu.



10 MENNINGARÆTLAN

Í hesum parti verður stutt greitt frá menningarætlanini fyri talvurnar í Regional Tourism Satellite Account umframt menningarætlanini fyri keldur og skipanir, sum eru neyðugar fyri at menna talvurnar.

Av tí at arbeiðið við RTSA umskarast við menningina av TSA, verður mett, at samvirkni kann fáast millum menningina av TSA og RTSA, um hesi verða ment samstundis. Mælt verður tí til, at menningin av RTSA fylgir neyvt somu menningarætlan, sum er lýst í høvuðsuppritinum um TSA.

Tað merkir, at tá ið menningararbeiðið fyri TSA fer í gongd, er týdningarmikið, at mátini eisini skulu kunna økisbýtast til RTSA. Tá hevur tað týdning, at viðkomandi keldur og háttaløg til økisbýtt ferðavinnuhagtøl verða ment samstundis sum menningararbeiðið við TSA. Tað vil siga, at tá ið menning av keldum, háttaløgum og skipanum til talvu 1 í TSA fer í gongd, skal menningarbeiðið av økisbýttum ferðavinnuhagtølum til talvu 1 í RTSA eisini byrja. Endamálið við hesum er at skipa menningararbeiðið skynsamt.

Víst verður tí til menningarætlan fyri talvur og keldur í høvuðsuppritinum. Myndirnar niðanfyri vísa eitt yvirlit yvir menningarætlan fyri talvur og keldur til TSA og RTSA. Menningin av TSA og RTSA brúka í høvuðsheitum somu keldur. Høvuðsmunurin er, at keldurnar skulu víðkast til at innihalda økisbýttar upplýsingar.




Keldur og skipanir
Fyrsta árið
Annað árið
Triðja árið
Gistingarskipanin
Spurnakanningin til ferðavinnuveitarar
KT-arkitekturur
Gjaldskort
Spurnablað til ferðafólk
Innsavningarskipan til spurnablað
Eurostat: Airbnb, Tripadvisor, Expedia og booking.com
Smyril Line, ferðafólk sjóvegis, mánaðarliga
Ferðandi á flogvøllinum eftir landi, mánaðarliga

11 KELDULISTI

Cañada, Agustín (2013), ***Regional Tourism Satellite Account.*** Madrid: United Nations World Tourism Organization.

Eurostat (2013), ***Manual on Regional Accounts Methods.*** Luxembourg: Publications Office of the European Union.

Fonnesbech-Sandberg, Martin & Krag, Jeppe (2021), ***Turismens økonomiske betydning i Danmark 2019.*** Keypmannhavn: VisitDenmark.

Frenţ, Christi & Frechtling, Douglas C. (2020), ***Regional Tourism Satellite Accounts: Towards International Comparability.*** Bingley: Emerald Publising Limited.

Karlsdóttir, Anna & Nora Sánchez Gassen (2021), ***Regional Tourism Satellite Accounts for the Nordic Countries.*** Stockholm: Nordregio.

United Nations Statistics Division, Statistical Office of the European Communities, Organization for Economic Co-operation and Development & World Tourism Organization (2008***), Tourism Satellite Account: Recommended Methodological Framework 2008***. Madrid: World Tourism Organization.

United Nations Statistics Division & World Tourism Organization (2008), ***2008 International Recommendations for Tourism Statistics***. Madrid: United Nations World Tourism Organization.

Zhang, Jie & Hedetoft, Anders (2011), ***Turismesatellitregnskab og turisters forbrugsmønstre i Danmark.*** Keypmannahavn: Jurist- og Økonomforbundets forlag.

HAGSTOVA FØROYA
KVÍGGJARTÚN 1 • POSTRÚM 2068 • FO-165 ARGIR